Eysturoyar dansifelag

**Rimmardansur**

Fríggjakvøldið tann 20.januar 2012 høvdu vit boðið Tøkum Lætt úr Havn at koma at vitja okkum - eitt gerandis dansikvøld í Hæddini , men nakað trivaligari enn vanligt. Úr Havn komu millum 40 og 50 fólk, og frá okkum sjálvum vóru umleið 55. Vit byrjaðu at dansa beinanvegin, sum bussurin við gestunum var komin kl. 21.00. Vit steðgaðu á at eta breyð út móti midnátt og fóru so aftur at dansa einar tveir tímar. Stuttligt og gevandi at samla so nógv fólk, sum eru góð við okkara dans.

Og væl kom burturúr.

Seinasta vetur bleiv tað av tilvild soleiðis, at bæði hesi feløgini hvørt sær kvóðu “Gøtuskeggjar” til upptøku hjá Kringvarpinum, so vit gjørdu av at byrja við hesum kvæðnum. Andras úr Norðagøtu skipaði til umleið ørindi 70, tá Óli á Geilini tók yvir og kvað til liðugt var - 114 ørindir í alt. Teir báðir brúka hvør sítt lag, men tað gjørdi onki tvørturímóti!

Yngri sjóvarbóndin, Jens Henrick Djurhuus (1799-1892) hevur yrkt kvæðið. Hann bygdi eisini í 1844 elsta partin av húsunum í Tinggarðinum, sum fólk enn býr í.

Harafturat kvóðu vit Brúsajøkil, Gudbrandskvæði, Viljorm Kornus, Jeg ser så mangt et orlogsskib, Brókatátt, Kong Hans, Tá eg verði stórur, Blakman Konge, Bjarnabana, Jómsvíkingar, Ormin Langa og Har bylgjan leikar - eini 650 ørindir tilsamans.

Vit fara at líta aftur á hetta kvøldið við gleði.

Kathrina, formaður í Eysturoyar dansifelag.